Sosialurin

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Fyritaksstjóri: Kristjan Dahl
Ljósmyndari: Kalmar Lindenskov

Blaðfólk: Randi Jacobsen - Dagny Joensen - Törfinn Smith - Hilmar Jan Hansen - Justinus Eldesgaard

Útgevari, uppseting og prent: P/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegi 26 Argjum

Postadr.: Postsmoga 78 110 Tórshavn
Telefon: 11820
Telefax: 14720

Nyrup & Co. klára ikki at halda trýstinum niðri

Oddagrein

ÓGVULIGA ivasamt er um føroyingar fáa nakra bankakanning. Tað stendur greitt eftir at rættarnevndin hjá løgtinginum er komin heimaftur av kunningarferð í Danmark. Hóast formaðurin í nevndini eftir hesa ferð váttar, at tað er ikki altavgerandi, at tað verður ein dómari, sum stendur fyri bankakanningini, so ger hann tó samtíðis greitt, at kanningin eigur at vera munnlig og almenn. Hetta hevur danska stjórnin higartil sýtt fyri.

VIÐ øðrum orðum stendur nú opið, hvat kann henda í málinum. Spurningurin er, um ein donsk stjórn saman við einum andstøðuflokki, sum fegin vil sleppa upp í eina stjórn eftir komandi val, kann liva við ikki at ganga krøvunum hjá løgtinginum á møti og harvið framhaldandi leggja lok á bankamálið!

NETTUP tá tað prutlar so harðliga undir lokinum hevur stjórnin lítið annað í at velja enn sjálv at lætta fyri trýstinum. Ger hon ikki tað, so kann henda - tað eigur tað eftir náttúrulógunum - at trýstið sum frálíður verður so nógv og øgiligt, at lokið verður "sprongt" av tvs. at so nógv fer at koma fram í málinum og at hetta verður so mikið avdúkandi, at eingin stjórn í einum demokratiskt stýrdum landi kann liva við, tí enn minni yvirliva.

HELST fer álitið frá Rættarnevndini at verða í tráð við tað, sum formaðurin hevur boðað frá. Tvs. ikki krav um eina dómarakanning við dómara men um eina kanning, har avhoyring er munnlig og almenn. Spurningurin er so um danska stjórnin skal hava stundir til at kunna svølgja hesum bita ella um hon ger upp við seg sjálva og sær, at her er eingin onnur loysn!

HÓAST teir konservativu í løtuni stuðla stjórnini, so hava teir longu drigið í land og sagt, at kann tað prógvast, at eitt nú ráðharrar í stjórnini hava borið seg skeivt at, so skulu teir eisini taka avleiðingarnar av hesum. Engel sigur, at hann er ikki bangin fyri at atkvøða fyri eini misálitisváttan móti stjórnini um so er.

MEN málið er meira herskið fyri Engel og hansara fólk enn so. Tí ein kanning ella bara tað at meira kemur fram í fjølmiðlunum kann vera eitt tvíeggjað svørð fyri teir konservativu, tá tað fer at koma meira fram um leiklutin og planin hjá tí konservativa Schluter og øðrum.

TAÐ, sum er komið fram í dagsins ljós í seinastuni, er so mikið álvarsligt og skakandi, at tað í sær sjálvum er nokk til at trýsta lokið av og fáa alt málið lýst. Hetta vera Nyrup & Co. noydd at sanna. Tað ringasta fyri tey og fyri ríkisfelagsskap er ein endi, har eingin kanning verður. Tá fara náttúrulógirnar at virka og alt kemur fram kortini - við ella uttan eina kanning.

Sosialurin

Jørgen Thomsen farin



Fyri bert tveimum vikum síðan vóru vit saman við Jørgen Thomsen á landsfundi Javnaðarfloksins og sóu hann tá so spelknan, ferðugan og eldhugaðan sum ikki hevði verið leingi, og máttu meta, at nú hevði hann vunnið á heilsutrupulleikunum, sum darvaðu seinastu árini, áðrenn hann avgjørdi at hann stillaði ikki upp aftur í 1994.

Tí kom boðini í gjár so sera dátt við fyri familju og næstringar, fyri okkum, sum kendu hann. Seinasta avrikið, har hann við føstum vilja, áhaldni og í sterkari sjálvsvenjing bygdi sær heilsuna upp aftur var so eyðkennandi fyri Jørgen, sum var sera viljasterkur og støðufastur í tí hann tókst við, og sum megnaði at liggja á takinum, eisini tá mótrákið skeyt ætlanina av hondum ella longur fram í tíðina.

At hann hevði ætlanir um verk at inna í komandi tíð á øðrum økjum enn tí politiska, var tí sjálvsagt og tær váttaðu, hvussu væl hann dugdi at leggja lívið um – farin úr fremstu rað í politikki. Hetta er fáum politikarum beskorið.

Men nú skuldi so vera, at hesum ætlanum røkk hann ikki, 68 ár vóru honum tilmáld.

Tað eg kenni til, 68 sera virkin ár, sum tey mongu støtv, álitisstørv og virkisøki, útvarpið nevndi í dag, vátta.

Í øllum hesum verki og á øllum økjum álitismaður burturav og virdur av flestu føroyingum og øðrum í samskifti.

Jørgen varð á ungum árum sannførdur um, at javnaðarhugsjónin var hin rætta, og hin einasta, ein maður, sprottin úr korum sum hansara, kundi kenna samleika við. Hann tók tíðliga lut í politiskum arbeiði og felagslívi og kanska serliga virkin afturkomin úr Grønlandi í 1964, júst í tí tíðarskeiðnum, tá javnaðarpolitikkur av álvara var sloppin at seta sín dám á samfelagsgongdina.

Hóast virkin í fremstu rað í mong ár, kom hann ikki á ting fyrr enn í 1978, og tað mundi ikki vera lættasta takið, tí ofta er tungt at lyfta arv eftir kendum og dugandi politikara og tað var J. Fr. Øregaard, sum Jørgen skuldi loysa av. Hann megnaði tað, og varð valdur aftur hvørja ferð, hann stillaði upp og sat á tingi í samfull 16 ár, borin av álíti í valdømi sínum.

Jørgen hevði drúgvar royndir úr arbeiðslívinum á sjógvi og landi, og arbeiðsfólk, útróðrarmenn og fiskimenn, hann virkaði ímillum og fyri, serliga sum tekniskur leiðari í Føroyingahavnini í 5 ár og arbeiðsformaður á Skála Skipasmiðju í 14 ár, høvdu størstu virðing og gott samlag við hendan hóvliga mann, sum seinni í politiska virki sínum á tingi sýndi seg arbeiðaravinur burturav.

Afturkomin til Føroya í 1970 kom eg at kenna Jørgen Thomsen og samstarvið frá 1978 og frameftir gjørdist ógvuliga neyvt, og meti eg hetta sera høgt. Jørgen var dyggur í ráðum, altið fúsur til verka og góður at viðgera størri og smærri politisk mál saman við, venda og snara hesum, meta um avleiðingar, orku og rættleika av ymsum møguleikum fyri loysn og vóru samrøðurnar nátt sum dag hundraðvís í tal. Persónliga kendi eg tað ríkandi at byggja upp slíkt vinarlag so fullkomuliga uttan svik.

Jørgen Thomsen sat á tingi saman við stórum tali av munandi yngri tingmonnum, og bar tí við sær eyðkenni frá einum eldri tíðarskeiði, har dentur varð lagdur á tað høviska og hóvsemi. Støðufastur men stillførur og ógvuliga siðiligur í orð og tal. Medferð hansara var álitisvekjandi og skapti honum virðing millum manna og sera dámligt var at merkja sær hansara kærleika til málið. Tað var greitt, at hann legði sær eina við at hava góðan og mergjaðan málburð, og styrkti hetta eisini próvgrundir hansara í kjaki.

Sum nevnt var Jørgen Thomsen sera grundfestur í javnaðarstevnuni og sera støðufastur, men hann dugdi kortini væl politisku telvingina, sum hevur serligar fortreytir, sum byggja á »give and take« – lata og taka – tí tú fært onga ávirkan, tvíheldur tú um at taka alt, semjur mugu gerast, sum røkka ávegis, og tú ert noyddur at ganga sjónarmiðum og hugsjónum annara til møtis. Jørgen leitaði eftir úrslitum, sum kundu skapa framburð og betri livikor hjá teim, hann vildi umboða, og júst tí hann var álitismaður burturav rakk hann eisini úrslitum.

Ein politisk mynd er ofta eintáttað, meðan menniskjan sjálv er sera fjølbroytt, og Jørgen Thomsen hevði tí ein víðan sjónarring út um løgting og partapolitikk.

Hann livdi í eini fastari gudstrúgv og talaði á mongum kristiligum samkomum, hevði alsk til okkara aldargamla dans og alla okkara mentan, sjálvstýrissinnaður javnaðarmaður, sum hann var. Hann var sera virkin í fráhaldsrørsluni, men til reiðar til at taka tøk, skuldu broytingar gerast, og var tí við til at bera broytingina í rúsdrekkaskipanini igjøgnum tingið, og so seint sum á landsfundi floksins nýliga talaði hann nógv um at fáa rættað tey brek, sum nýggja skipanin sýndi seg at goyma.

Strævnastu og mest uppslítandi tíð sína hevði Jørgen tey árini hann bæði var formaður tingbólksins og figgjarnevndarformaður, t.v.s. tey seinastu árini og á fráfaringarrøðu síni hugleiddi hann eitt sindur um tann stóra skilnað, sum er ímillum hugsjónir, hvussu hart stríðið kann gerast og hvussu andsagnarfylt tað kann tykjast. Kortini takkaði hann øllum fyri, at hann kundi kenna at sjálvt hetta hevði ikki skapt honum ein einasta veruligan figginda, men nógvar vinir. Hesum kundu tinglimir einans taka undir við.

Hetta er gott eftirmæli hjá tykkum, sum eftir sita, at minnast. Jørgen var framúr familjukærur og saknurin hjá tykkum verður størur.

Vit koma at sakna ein góðan vin og lýsa frið yvir minnið um hendan vin og stríðsmann, Jørgen Thomsen.

Atli P. Dam